





Hugsa tær. Eina ferð við Norrønu, har tú og makin kunnu njóta ekslusivu atmosferuna í suituni á glæsiliga ferðamannaskipi føroyinga. »Jú, men tað kostar« vilja summi helst halda, men tað nýtist nú ikki at kosta so nógv.

Saman við Smyril Line og Føroya Sparikassa gevur Sosialurin nevnliga tær møguleikan at fara á dreymaferðina. Ferðast sjálvur annar á eini av rutunum hjá Smyril Line við øllum tí marglæti, sum stóra ★★★ ferðamannaskipið gevur tær.

Og tað er ikki nóg mikið við tí. Umborð á Norrønu hevur tú eisini sersømdir, tí Føroya Sparikassi gevur tær eina konto umborð, har tú kanst nýta upp til 10.000 kr. á ferðini. So skuldu ráðini verið til bæði eitt og annað.

Umframt høvuðsvinningin, verður eisini ein eykavinningur drigin. Hesin er ein ferð fyri tvey vaksin og tvey børn við bili til Danland í Blokkhus í eina viku.

Og tað er sera einfalt at vera við í kappingini. Sjey leygardagar á rað verður spurnarblað í Sosialinum, har tríggir spurningar skulu svarast. Fyrsta spurnarblaðið var í blaðnum 11. september, og er talan hesaferð sostatt um næsta umfarið. Tá øll spurnarbløðini eru svarað, skulu hesi sendast okkum í einum brævbjálva. Brævbjálvin skal merkjast »dreymaferð« og skal sendast til:

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Bert seðlar, sum eru kliptir úr Sosialinum kunnu vera við í kappingini. Loyvt er ikki at senda avrit av seðlum.

Saman við svarlepanum skulu vit hava upplýsingar um navn, bústað og tlf. nummari hjá tær. Svarleparnir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 27. oktober, og leygardagin, 30. oktober verður so almannakunngjørt, hvørji eru hepnu vinnararnir.



Sosialurin

**DREYMAFERÐIN 7. UMFAR**

Hesaferð snúgva spurningarnir seg um tónleik.

**1** Hvat efirnavn hevur Eivør?

**2** Hvat eftirnavn hevur Petsi?

**3** Hvat eftirnavn hevur Guðrun?

FØROYAPRENT - TEL. 314 555



# Innbjóðingin hóskar ikki til okkum

**Stjórin í Vinnuhúsinum, Jan Mortensen, staðfestir, at føroyskt vinnulív hevur lítlan áhuga í donsku innbjóðingini til Japan. - Føroysk virkir eru fyri tað mesta undirveitarar hjá japanskum virkjum, og júst henda innbjóðingin stílar ikki júst ímóti eini menning av slíkum samstarvi, sigur hann**

DROTNINGAVITJAN TIL JAPAN

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*–Vit hava loddað dýpið í føroyska vinnulívinum, og flestu virkini svaraðu, at tey í løtuni høvdu neyðuga samsbandið við japanskar fyritøkur. Fleiri teirra svaraðu eisini, at tey fyri stuttum høvdu vitja Japan. Okkara niðurstøða av hoyringunum var tí, at innbjóðingin ikki hevur áhugað í løtuni, sigur stjórin í Vinnuhúsinum, Jan Mortensen*

*Mynd: Savnsmynd*

Tað er ikki á hvørjum degi, at løgmaður Jóannes Eidesgaard leggur seg út í blaðkjak við løgtingsformannin, Edmund Joensen.

Fyrr í vikuni hevði Edmund Joensen eitt lesarabræv um vitjanina hjá Margretu drotning til Japan seinni í november, har føroyskt vinnulív hevur fingið møguleika at vera við í fylginum hjá drotningini. Løgtingsformaðurin fýltist á, at lítið ella einki hevði verið a hoyrt frá Føroya Landsstýri um fyrireikingar til innbjóðingina, sum eftir hansara tykki var eitt frálíkt høvi hjá føroyingum at skapa kunnleika um Føroyar í Japan, eins og ein gyltur møguleiki fyri framburði fyri føroyskan handil og vinnu.

Í bløðunum í dag, svarar løgmaður Jóannes Eidesgaard løgtingsformann-inum aftur. Løgmaður vísir á, at Løgmansskrivstovan sendi innbjóðingina til Vinnumálaráðið, Fiskimálaráðið og Mentamálaráðið til ummælis, men boðini frá teimum trimum ráðunum vóru greið: Føroyingar hava ongan ítøkiligan áhugamál í Japan í løtuni, og tí varð takkað nei til innbjóðingina.

Vit hava vent okkum til stjóran í Vinnuhúsinum, Jan Mortensen, fyri at spyrja, hvussu tað ber til, at føroyskt vinnulív, sum ekur á knøunum í løtuni, ikki hevur valt at taka av gylta møguleikanum at fáa íblástur úr Japan, sum av mongum verður mett at ganga á odda innan nýhugsan innan altjóða vinnulív.

## Eingin áhugi

Jan Mortensen er persónliga av teirri sannføring, at innbjóðingin til Japan kundi verið eitt frálíkt høvi hjá føroyskum vinnulívi at menna seg. Hann staðfestir hinvegin, at umboðini fyri føroysk vinnulív ikki eru eins eldhuga fyri donsku innbjóðingini.

– Vit hava loddað dýpið í føroyska vinnulívinum, og flestu virkini svaraðu, at tey í løtuni høvdu neyðuga samsbandið við japanskar fyritøkur. Fleiri teirra svaraðu eisini, at tey fyri stuttum høvdu vitja Japan. Okkara niðurstøða av hoyringunum var tí, at innbjóðingin ikki hevur áhugað í løtuni, sigur stjórin í Vinnuhúsinum.

Hann slær kortini fast, at hugburðurin millum føroysk vinnulívsfólk er ikki tann, at japanski marknaðin als ikki hevur nakran áhuga.

– Tað eru fleiri føroyskar fyritøkur, eitt nú Havsbrún, ið hava nógv samskifti við japanar. Orsøkin til lítla áhugan hesaferð tykist heldur vera sjálv innbjóðingin. Føroysk virkir hava ikki á sama hátt sum donsk virkir ein breiðan áhuga í japanska marknaðinum. Meðan donsku virkini eru stór, eru okkara lítil, og tá tiltakið í Japan er stílað ímóti eini breiðari kunning, verður innbjóðingin minni áhugaverd hjá okkum. Føroysk virkir eru fyri tað mesta undirveitarar hjá japanskum virkjum, og júst henda innbjóðingin stílar ikki júst ímóti eini menning av slíkum samstarvi, sigur hann.

# Kardamumma er komin til býin

TÍÐINDASKRIV
*frá Havnar Sjónleikarfelag*

Fríggjakvøldið 29. oktober kl. 19 verður fyrsta framførsla av barnaleikinum "Fólk og dólgar í Kardamummubýnum" í Sjónleikarhúsinum í Havn.

Hetta er aðru ferð, at leikurin verður framførdur í Sjónleikarhúsinum. Leikurin varð seinast sýndur í 1987, og fekk hann tá góða undirtøku millum fólk, bæði børn og vaksin - og kanska dólgar við.

Søgan um Kaspar, Jaspur og Jónatan, Suffíu mostir, Bastian politimeistara, Tobias í torninum, Kamomillu, Remo, Tommy og øll hini fólkini í Kardamummubýnum er ein klassikari, sum hevur verið framførdur um allan heim - og ein klassikari, sum væl kann verða framførdur aftur.

Kendi norski rithøvundurin Thorbjørn Egner hevur skrivað bókina um Fólk og dólgar í Kardamummubýnum. Harumframt hevur hann latið mangt annað úr hondum - serliga kendar eru søgurnar um Karius og Baktus, Klintrimús og hini dýrini í Valbakkaskóginum og Djóragóða. Vit eru so heppin at hava hesar bøkurnar á føroyskum. Tað er Bókadeild Føroya Lærarafelags, sum hevur givið tær út.



Eini 40 fólk eru við í leikinum - bæði á palli og handan pall - og millum teirra eru fleiri kend og fleiri minni kend andlit. Tað er Elin á Rógvi, sum leikstjórnar, og hevur Elin hollar royndir innan barnaleik - bæði sum leikari og leikstjóri. Elin leikstjórnaði í 2002 barnaleikin um Kúlla Knút, umframt at hon leikstjórnaði Leikhúsjól 2003.

Jenny C. Petersen og Eyðun Johannsen hava týtt leikin um fólk og dólgar í Kardamummubýnum til føroyskt.

Høvuðsleiklutirnar sum dólgarnir hava ávikavist Nikolaj Falck, Finnur Jensen og Hjálmar Dam. Bæði Nikolaj og Finnur hava roynt seg á palli í Sjónleikarhúsinum áður, men hetta er fyrsta royndin hjá Hjálmari. Leiklutinum sum Suffía mostir hevur Katrin L. Mortensen, og leiklutirnir sum Bastian politimeistari og Tobias eru mannaðir við so royndum leikarum sum Jógvani E. Ósá og Jógvani Salamon Joensen.

Anna Sofía Egilstrøð - sum eisini er mostir - hevur sniðgivið pall og búnar, og Tove Askham hevur málað Kardamummuteppið.

Hóast leikurin hevur verið framførdur áður, hevur Havnar Sjónleikarfelag valt at taka leikin upp aftur, tí nú er eitt heilt nýtt ættarlið av børnum í Føroyum, sum eisini skal fáa høvi at síggja hann. Tað unna vit teimum so hjartaliga. Leikurin er ein barnaleikur, men tá um Kardamummubý ræður, eru vit øll børn, og leikurin er fyri øll.

Atgongumerki á 100 kr. eru at fáa í Kunningarstovuni og í Sjónleikarhúsinum 1 tíma undan sýning.


**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**
**www.bio.fo**




Leygardagin 23.10. kl. 20:00
Leygardagin 23.10. kl. 22:45
Sunnudagin 24.10. kl. 19:30
Sunnudagin 24.10. kl. 22:15




Leygardagin 23.10. kl. 18:30
Sunnudagin 24.10. kl. 20:00




Leygardagin 23.10. kl. 21:15
Sunnudagin 24.10. kl. 22:45




Leygardagin 23.10. kl. 23:30
Sunnudagin 24.10. kl. 17:45




Leygardagin 23.10. kl. 18:00
Sunnudagin 24.10. kl. 17:30

P BIO KIOSKIN P
**Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.**